Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

§ 52a-fyrispurning nr. 69/2019 frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, viðvíkjandi veðhaldi í landbúnaðinum

Spurningurin var soljóðandi:

1. *Ætlar landsstýrismaðurin at gera broytingar viðvíkjandi veðseting í landbúnaðinum?*
2. *Um so er, nær kunnu vit vænta, at hesar broytingar koma í gildi?*

Svar:

Svarað verður undir einum.

Í álitinum frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 2007, sum verður nevnt í fyrispurninginum, metir Umboðsmaðurin, at kravið um persónligt veðhald er ein órímilig treyt at seta festarum, ið taka lán frá Búnaðargrunninum. Hesin háttur Búnaðargrunsins at tryggja ognir sínar stendur ikki mát við tær avleiðingar, sum kunnu verða fyri festaran, og er tískil ikki í samsvari við markregluna (proportionalitetsprincippið), sum er galdandi fyri fyrisitingina. Markreglan ásetur, at fyrisitingin hvørki kann ella eigur at gera størri inntriv í rættindini hjá borgarunum, enn endamálið við atgerðini tilskilar.

Í sama áliti staðfestir Løgtingsins Umboðsmaður, at tað hvørki í lóg ella kunngerðum eru ábendingar um, at ætlanin hevur verið, at Búnaðargrunnurin skuldi tryggja lán síni við persónligum veðhaldi.

Búnaðargrunnurin hevur fyri Umhvørvis- og vinnumálaráðnum upplýst, at arbeitt verður við at fara burtur frá persónligum veðhaldi fyri lán til landbúnaðin. Frameftir er ætlanin at veita lán soleiðis, at tey fyrst og fremst verða latin við veð í festibrævinum og við veð í møguligari mjólkakvotu. Afturat hesum kann verða viðkomandi at áseta eitt hóskandi persónligt veðhald (sum stýringspant), sum eigur at verða roknað í hvørjum einstøkum føri í mun til ta einstøku verkætlanina, sum lán verður tikið til.

Vísandi til, at Stýrið fyri Búnaðargrunnin er farið undir at arbeiða við hesum viðurskiftum, ger landsstýrismaðurin ikki meira við málið í løtuni.

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður